## Kendur háskúli steingir



Haslev Udvidede Højskole hevur í longri tíð havt trupulleikar at fáa nóg mikið av næmingum til tað drúgva várskeiðið. Og nú er tað 23 vikur langa skeiðið í vár avlýst. Hetta hevur aftur við sær, at skúlin ikki kann halda seg til endamál sítt, og má tí fyrireika seg uppá at steðga virkseminum. – Vit hava gjøgnum árini givið hundraðtals næmingum lívsupplýsing, upplivingar og mót uppá lívið, men hetta er ikki gjørligt longur, harmast nevndarformaðurin Mogens Larsen.

## Føroyskur granskari fingið stóra játtan

Sjúrður F. Olsen úr Havn hevur sum verkætlanarleiðari fingið 34 mió. kr. játtaðar til eina nýggja granskingarmiðstøð. Talan er um "Centre for Fetal Programming", sum Sjúrður skal verða leiðari fyri. Stóra játtanin er frá "Det Strategiske Forskningsråds programkomite for sundhed, fødevarer og velfærd"., skrivar kringvarp.fo. Í tíðindaskrivi frá Granskingarráðnum verður sagt, at talan er um eitt konsept, sum tengir umhvørvisávirkan á fosturstigið við vandan fyri sjúkum seinni. Við í verkætlanini er eitt samtak av granskingarstovnum við m.ø. Statens Serum Institut í Keypmannahavn, har Sjúrður F. Olsen er professari. Hann er eisini adjungeraður professari við Harvard Univeristy.

# Reiðarans maður við húð og hár

**Tað er skoðsmálið, sum sitandi formaður í Føroya Fiskimannafelag, Jan Højgaard, gevur kappingarneyta sínum, Henriki Old, í ágangandi lesarabrævi, har eisini verður lagt eftir undanmanninum og eftir minnilutanum í leiðslu felagsins**

FF-VAL
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Í lesarabrævi í Sosialinum í gjár leggur sitandi formaður í Fiskimannafelagnum, Jan Højgaard, rættiliga hart út og rópar mótvalevnið til formansvalið "Ein funnin fressur hjá reiðarunum"*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Jan Højgaard, formaður í Fiskimannafelagnum, leggur í Sosialinum í gjár rættiliga hart út í stríðnum um formanssessin, nú val er í felagnum í ár og Henrik Old, fyrrverandi løgtingsmaður, hevur latið seg stillað upp ímóti sitandi formanni.

Formaðurin leggur serliga eftir tí partinum av leiðslu felagsins, sum ikki hevur sungið so væl við í hansara kóri farni trý árini, sum meirlutin hevur gjørt, men hann leggur eisini eftir undan-manni sínum, Óla Jacobsen.

Í leiðsluni í Fiskimannafelagnum er felagsformaðurin umframt seks sýsluformenn, og soleiðis sipar Jan Højgaard helst til teir tríggjar í minnilutanum, sum eru Eyðun Johannesen, næstformaður, Karl Isaksen og Fríðrik Sivertsen.

At enda í lesarabrævinum stendur avbjóðarin, Henrik Old, fyri skotum, og her endurtekur felagsformaðurin ymiskt av tí, hann segði longu, tá tað gjørdist greitt, at fyrrverandi løgtingsmaðurin hevði latið seg stillað upp.

### Funnin fressur

- Eg havi einki ímóti at fáa kapping, men tit skulu bara gera tykkum greitt, at mótvalevni hjá mær bæði hevur verið skipari og reiðari.

Í lesarabrævinum sigur formaðurin, at Henrik'sa hjarta bankar ikki fyri fiskimonnum, men fyri reiðarunum.

- Henrik hevur altíð verið reiðarans maður við húð og hár, bæði á landi og á brúnni. Hetta kemur ikki at broytast fyri tað, um hann setir seg við róðrið á Bryggjubakka.

Jan Højgaard sigur eisini, at drúgva tíðin hjá Henriki í politikki langt síðan hevur gjørt hann til eitt við politiska "systemið", sum hann tekur til og heldur, at fremstu áhugamálini hjá hesi skipan eru at skerja hart vunnin rættindi, eitt nú sjómansfrádráttin.

- Henrik Old er ein funnin fressur hjá reiðarunum, sum í hesi løtu sita spentir og bíða eftir úrslitinum av formansvalinum og vóna, at hann vinnur valið.

### Endurtekur lyftir

At enda í sínum lesarabrævi lovar sitandi formaður, at verður hann valdur aftur, fer hann framhaldandi at berjast fyri rættindum hjá fiskimonnum.

- Tað verður ikki við mær sum formanni, at politikarar sleppa at avtaka inntøkutrygdina, sigur hann.

Eins og undan valinum fyri trimum árum síðan, tá Jan Højgaard varð valdur til formann í kapping við Dan Reinert Petersen og Óla Jacobsen, endurtekur hann kravið um, at skipsmanningar skulu hava frí jólahalgidagarnar, sum hann nú rópar teir.

- Hetta fer samstundis at spara fiskidagarnar, sum frammanundan eru ov fáir, sigur Jan Højgaard, felagsformaður, í ágangandi lesarabrævi sínum.

# 2350 fiskimenn hava atkvøðurætt til formansvalið

**Fiskimenn hava høvi at velja fram til leygardagin 30. januar á middegi, og sjálvt um 31. januar er ein sunnudagur, verður talt upp hendan dagin, soleiðis at úrslitið av valinum er greitt 1. februar, tá nýggja formansskeiðið byrjar**

FF-VAL
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Formansvalið í Fiskimannafelagnum gongur yvir eina tíð, har fiskimenn hava høvi at atkvøða. Er einki mótvalevni, heldur sitandi formaður fram. Í ár er val í felagnum, nú Henrik Old hevur latið seg stillað upp ímóti Jan Højgaard, sum varð valdur fyri trimum árum síðan.

Tann, sum hevur flestar atkvøður millum hesar báðar, tá upptalt er, verður formaður tey næstu trý árini, sum valskeiðið er.

Felagsformansvalið í Fiskimannafelagnum er tí ikki, sum í mongum øðrum feløgum, har valt verður á aðalfundi – ella eftir ein aðalfund, har nývalda nevndin skipar seg sjálv við eitt nú formanni og næstformanni.

Í ár fella dagarnir í endanum av januar mánaði soleiðis, at 31. januar er ein sunnudagur.

Fiskimenn hava tí fingið høvi at velja fram til leygardagin 30. januar á middegi, og sjálvt um 31. januar er ein sunnudagur, verður talt upp hendan dagin, soleiðis at úrslitið av valinum er greitt 1. februar, tá nýggja formansskeiðið byrjar.

Jan Højgaard, felagsformaður, sigur, at felagið hevur havt í huga, hvussu dagarnir fella, men kortini er gjørt av, at uppteljingin skal fara fram sunnudagin, 31. januar.

Á skrivstovuni verður annars upplýst, at teir fiskimenn, sum hava atkvøðurætt, eru menn, sum hava verið mynstraðir sambært sáttmálanum hjá Fiskimannafelagnum árini 2008 og 2009.

- Atkvøðuseðlar eru sendir beinleiðis út til adressuna hjá fiskimonnum og samlaða talið av limum, sum hava høvi at velja hesaferð, liggur um 2350, verður sagt á Bryggjubakka.

Á valinum fyri trimum árum síðan var valluttøkan ein stórur helmingur av teimum, sum tá høvdu atkvøðurætt.